LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 26. mars 2025
J. nr.: 25/07431-2

Svar

upp á

skriftligan fyrispurning nr. 52-092/2024 eftir § 52a í Tingskipanini um samskipan av bjarging og tilbúgving

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Samskipan av bjarging og tilbúgving

Spurningar:

1. Hvussu verður bjarging og tilbúgving samskipað í Føroyum í dag, og í hvønn mun og á hvønn hátt samskipar landið bjarging og tilbúgving?

2. Hvussu nógvar alment fráboðaðar bjargingar vóru í Føroyum 2023 og 2024?

3. Hvussu er samskiftið millum partarnar skipað, tá ein bjarging skal fremjast?

4. Metir landsstýrismaðurin, at Føroyar eru brynjaðar til stórar vanlukkur á sjógvi og landi?

5. Arbeiðir landsstýrismaðurin við ítøkiligum ætlanum á hesum øki?

Svar til spurning nr. 1

LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Viðvíkjandi tilbúgving er tað er mín ábyrgd sum landsstýrismaður í tilbúgvingarmálum at samskipa tilrættisleggingina av tilbúgvingini. Endamálið við hesum er at tryggja eina samvirkandi tilbúgving fyri alt landið.

Eisini er tað mín uppgáva, fyri at tryggja eina samvirkandi tilbúgving, at veita myndugleikum, kommunum og fyritøkum ráðgeving um tilbúgving.

Sí svar til spurning nr. 3 viðvíkjandi bjarging.

Svar til spurning nr. 2
Á heimasíðuni hjá Vørn er eitt yvirlit har tað sæst, hvussu nógvar letingar og bjargingar (SAR-tilburðir) hava verið seinastu árini.

Í árunum 2023 og 2024 vóru ávikavist 39 og 44 tilburðir. Til ber at kunna seg nærri um hesar tilburðir á heimasíðuni.

Svar til spurning nr. 3
Tað veldst um, hvat slag av bjarging talan er um og hvussu nógvir partar av tilbúgvingini krevjast til at loysa uppgávuna.

Heilt yvirskipað kann sigast, at samlað átøk á landi og á vøtnum verða samskipað av løgregluni, ið tá samskiftir við partarnar, meðan samlað átøk á sjónum verða samskipað av MRCC Tórshavn.

Afturat øllum hesum er eisini ein kreppustýringarskipan, um talan verður um størri tilburðir.

Svar til spurning nr. 4
Sum heild meti eg at Føroyar eru rímiliga væl førar fyri handfara flest allar vanlukkur. Tað hevur tó verið sett spurnartekin við, um vit klára at handfara heilt stórar vanlukkur, t.d. við stórum ferðamannaskipum. Føroyar hava eisini avtalur við okkara grannalond um at veita okkum hjálp, ið kunnu vera avgerandi, t.d. í sambandi við størri bjargingarátøk á sjónum.

Svar til spurning nr. 5
Ítøkiliga hendir nógv innan landstilbúgvingina, ið kunnu betra um okkara bjargingarførleikar.

Oljutangarnir til bjargingartyrlurnar vera eftir ætlan útbygdir, sum ger okkum før at handfara størri vanlukkur á sjónum. Tyrlusáttmálin verður endurskoðaður í ár (hetta liggur tó í Fiskimálaráðnum).

Fyri at fáa eina kvalifiserøða meting av okkara førleikastøði, havi eg givið boð um, at ein váðameting skal gerast fyri Føroyar, so vit kunnu arbeiða meiri skipað og málrættað við at menna tilbúgvingina í Føroyum.

LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Eisini verður arbeitt við einari nýggjari kreppustýringarætlan, ið skal gera tað greitt, hvussu persónar og myndugleikar á operativum, taktiskum og politiskum stigi skulu samstarva, tá størri tilburðir gera hetta neyðugt í okkara samfelag.

Løgmálaráðið 26. mars 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður